## Gevast við at flúgva til Stord

VG veit í morgun at siga, at starvsfólkini hjá Aker Kværner hava gjørt felagnum greitt, at tey ikki ynskja at flúgva á Stord meira í teimum flogførum, sum nú verða brúkt til flúgvingina.

– Okkara limir hava sagt, at tey ikki ynskja at lenda á Stord meiri, og tað hava vit tikið til eftirtektar, sigur Leif Egil Thorsen, álitisfólk hjá Aker Kværner Elektro, við NRK.

Kunningarstjórin hjá Aker Kværner, Torbjørn Andersen, sigur, at avgerðin um at gevast við at flúgva til og frá Stord í verandi flogtypum, varð tikin umgangandi eftir vanlukkuna.

Dagligi leiðarin á Stord flogvøllinum, Jan Morten Myklebust, harmast um avgerðina og heldur, at hetta kann geva flogvøllinum fíggjarligar trupulleikar.



## Flogskiparararnir kunnu halda fram

Sleppa flogskiparar, sum hava verið fyri slíkum havaríi, har fólk hava látið lív, aftur at flúgva, ella hvussu eru prosedururnar?

– Eg vil vurdera, at tað sleppa teir. Teir skulu sjálvandi venjast uppaftur, men eg gangi út frá, at tað ikki er nakar trupulleiki hjá teimum at sleppa at flúgva aftur, um teir altso sjálvir ynskja tað, sigur Magni Arge.

# Tað mest umráðandi er at finna

**– Eg vakni hvønn morgun og vóni, at hetta bara var ein óndur dreymur, men tað er tað ikki – hetta er tann beiski veruleikin, men eg kenni stóran ugga í, at familjan hjá Guðrun hevur havt so stórt yvirskot til at hugsa um okkum í sorgini. Tey hava eggjað okkum til at halda á og ikki missa mótið, tí Guðrun var so glað fyri sítt arbeiðspláss. Tí kenna vit í felagnum tað sum eitt kall, at øll – frá ovast til niðast – standa saman og stríða okkum gjøgnum hetta ódnarveðrið og tryggja felagnum eina góða framtíð, sigur Magni Arge**



FLOGVANLUKKA

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

– Enn vita vit einki við vissu, men sakkunnleikin er komin til ta fyribilsniðurstøðu, at spoylararnir á veingjunum á flogfarinum ikki fóru upp. Vit vita enn einki um, hví so var, men út frá hesum seta vit fokus á spoylararnar.

Soleiðis sigur Magni Arge, stjóri í Atlantsflog eftir at norska havarínevndin hevur boðað frá, at orsøkin til vanlukkuna á Stord var, at spoylararnir ikki fóru upp soleiðis, sum teir eiga.

Magni Arge sigur, at Atlantsflog ger alt sum gerast kann til tess at hjálpa havarínevndini. Men hann leggur samstundis dent á, at talan er um eina fyribilsgreining, og at ikki ber til at døma út frá hesum.

Í Degi og Viku týskvøldið segði Johan í Niðristovu, flogovasti hjá Atlantsflog, at tey hava upplivað trupulleikan við spoylarunum tvær ella tríggjar ferðir áður, uttan at tað hevur ført til nakra vanlukku. Men tær ferðirnar hevur flogbreytin verið nóg long til at flogfarið kortini steðgar, ella hevur flogskiparin havt stundir til at tikið støðu til at fara uppaftur, sigur Magni Arge. Hann leggur dent á, at hann ikki er serkønur í slíkum tekniskum spurningum, men at sum hann skilir tað, so kunnu spoylararnir ikki fara upp, fyrr enn hjólini hava fingið rættuligt festi í flogbreytina – og at tað tí ikki hevur verið ein tøkniligur trupulleiki – men heldur, at flogfarið ikki rættuliga hevur sett seg.

*Kunnu vit sum brúkarar nú stóla uppá, at hini flogførini hjá Atlantsflog eru nóg trygg at flúgva við, og hava tit eftirhugt spoylararnar í teimum?*

– Vit liva upp til øll krøv, sum myndugleikarnir og framleiðarin seta okkum. Vit fylgja eisini øllum forskriftum í samband við eftirlit o. s. fr. Eitt óhapp sum hetta er sera, sera óheppið, og vit mugu finna orsøkina. Vit eru sera hart rakt, men vit hava onga orsøk til at halda, at vantandi viðlíkahald ella prosedurur hava verið orsøkin. Vit seta nú fokus á spoylararnar og eftirkanna allar operativar mannagongdir saman við framleiðaranum, sigur Magni Arge.

*Hvørji ítøkilig stig eru longu tikin?*

– Vit flúgva ikki upp á Stord. Vit gjøgnumganga allar prosedurur. Vit fara ígjøngum alt tað tekniska viðvíkjandi spoylarunum saman við framleiðaranum og eftirkanna allar forskriftir, sigur Magni Arge og vísir á, at felagið fer at intensivera allan innsats viðvíkjandi trygdini.

Hóast nógv hevur verið at hoyrt um trupulleikar við flogførum hjá Atlantsflog seinastu tíðina, so leggur stjórin dent á, at felagið ikki dylir nakað sum helst.

Mánakvøldið vóru trupulleikar við føroyaflogfarinum, sum skuldi fara úr Kastrup.

– Tað er rætt, at eitt tól í flúgvarinum ikki fungeraði sum tað skuldi mánakvøldið. Tað var seint, vit høvdu havt nógvar og drúgvar seinkingar um vikuskiftið av mjørka, og tað bar ikki til at fáa tað umvælt alt fyri eitt tað kvøldið. Tí valdi flogskiparin at fáa ferðafólkini á hotel, og flogfarið fór avstað í øllum góðum morgunin eftir, sigur Magni Arge.

– Hetta er júst eitt dømi um, at vit taka tingini í allar størsta álvara. Tað er tað sama við flapslendingunum í Bergen. Tá vit fáa slíkar trupulleikar, so siga forskriftirnar, at vit skulu trygdarlenda á einum longum vølli – hetta hevur als einki við neyðlending at gera, sigur Magni Arge, sum heldur, at hesar hendingar fingu ekstremt stóra umtalu í fjølmiðlunum.

– Men vit halda alla tíðina fast upp á prosedururnar!

Í norskum miðlunum hevur nógv verið at hoyrt um, at arbeiðsfólkið hjá Aker ikki vilja nýta flogvøllin á Stord. Í gjárkvøldið fríttist, at Aker hevur tikið avgerð um ikki at flúgva upp á Stord.

## Atlantic uppfyllir til øll statslig trygdarkrøv

**Tað sum hendi nú hevur absolutt onki at gera við okkara frágreiðing fyrr í ár. Atlantic Airways livir upp til øll statslig trygdarkrøv, og hóast flogfelagið framvegis er undir herdum eftirliti so hevur SLV álit á Atlantsflog**

FLÚGVING

*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Statens Luftfartsvæsen krevur, at flogfeløgini, teir hava eftirlit við liva upp til øll altjóða trygdarkrøv. Tað ger Atlantic Airways eisini, og virka teir undir somu treytum sum stór altjóða flogfeløg sum Lufthansa, Air France, SAS og fleiri onnur. Tað slær kunningarstjórin hjá Statens Luftfartsvæsen, Torben Anker, fast fyri Sosialinum.

– Tað eru somu reglur galdandi fyri allar partar, sigur Torben Anker.

Kunningarstjórin sigur eisini, at síðani Atlantsflog rættaði upp á tey frávik, sum Statens Luftfartsvæsen vísti á í frágreiðing síni, so livir Atlantsflog upp til øll statslig trygdarkrøv.

– Vit hava tó framvegis eitt hert eftirlit við Atlantic Airways og tað fara vit at hava eina tíð framyvir, sigur Torben Anker, sum ikki kann seta dato á, nær teir gevast við hesum og einans hava vanligt eftirlit við flogfelagnum.

– Men í samband við hert eftirlit eiga vit at hava í huga, at tað als ikki er óvanligt, at flogfeløg eru undir slíkum, tí vit trygdin er so ófatiliga umráðandi, sigur Torben Anker og vísir á, at Mærsk Air og Sterling Airways eisini vóru undir herdum eftirliti, tá hesi løgdu saman, fyri at tryggja sær at alt við trygdini kom í rætt lag.

Seinastu vikuna hava søgurnar verið mangar í norsku bløðunum, um standin hjá Atlantic Airways. Bæði navngivin og ónavngivin fólk hava greitt frá sínum upplivingum og royndum við Atlantic Airways.

Hetta gera vit kunningarstjóran hjá Statens Luftfartsvæsen vart við, og spyrja hann um hann framvegis hevur álit á Atlantic Airways eftir hesar søgurnar.

– Vit kunnu ikki fara at grunda okkara eftirlit á útsagnir í norskum bløðum um Atlantic Airways. Tað ber als ikki til. Vanligt er, at fólk, sum eru ónøgd, klaga um tað, men tað er altso ikki støðan í hesum málinum. Vit hava ongar klagur fingið úr Noreg um Atlantic Airways, hvørki frá norskum myndugleikum ella frá ferðafólki har, vísir kunningarstjórin í Statens Luftfartsvæsen, Torben Anker, á.